ítróttur

Nr. 135 • elygardagur • 19. juli 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

# Gunnar datt burturímillum



*Danirnir, sum luttaka í Statoil Kring Føroyar, hava dominerað kappingina higartil, og Thomas Japp Hansen er nú stórfavorittur at vinna kappingina*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Á teininum eysturoyarteininum hóskvøldið endaði føroyska vónin í Statoil Kring Føroyar góðar tólv minuttir aftanfyri vinnaran, og tí eru vónirnar um ein sigur ikki góðar**

SÚKKLING
*Stefan í Skorini*

Hesuferð var tað danin Ivan Kristensen, sum fór við sigrinum. Hann kom á mál saman við oddafiskinum samanlagt Thomas Japp Hansen.

Teinurin hesuferð var úr Havn ígjøgnum kaldbaks bergholið og norð til Eiðis, súkklað varð um Eiðisskarð til Leirvíkar, síðani fóru súkklararnir runt Agnið og málið var við Saltangará.

Hetta var nógv tann harðasti teinurin í kappingini.

### Ivan og Thomas slíta

Tá feltið kom til landsfjósið í Kollafirði fóru Ivan Kristensen og Thomas Japp Hansen frá hinum, og feltið slitnaði. Tað eydnaðist ikki Gunnari at koma við í hetta útbrotið, og hann megnaði ongantíð at fanga teir báðar fremstu aftur.

Ivan Kristensen og Thomas Japp Hansen, sum eru úr sama felagi, arbeiddu væl saman fyri at varðveita munin niður til hinar. Eftir Eiðisskarð gjørdi Gunnar eina roynd at fanga teir aftur, men hann fekk onga hjálp.

Hann súkklaði einsamallur, og tí var tað nærum ógjørligt at vinna inn á teir fremstu. Gunnar súkklaði einsamallur heilt frá Eiðisskarði til Leirvíkar og inntil Agnið.

Tað hevði við sær, at Gunnar onga megi hevði eftir, tá farið varð runt Agnið, og hann varð fangaður av Niels Jakob Thomsen, sum eisini fór framvið Gunnari og legði hann afturum seg við tveimum minuttum.

– Eg doyði fullkomiliga móti endanum av teininum. Kanska satsaði eg ov tíðliga í kappingini, men tað gerst ikki við, sigur Gunnar Dahl-Olsen, sum hevði trupulleikar við gervunum í byrjanini av kappingini, og tí fór hann ikki við Ivan Kristensen og Thomas Japp Hansen.

Niels Jakob Thomsen var úti fyri einum óhappi áðrenn kappingina hósdagin, har hann meisladi sær høgra legg og arm og hevði pínu í síðuni. Hetta hevði við sær, at hann ikki súkklaði við fullari megi hósdagin, men hann fekk tó eitt gott úrslit.

### Stórur munur

Nú hevur Gunnar eitt langt lop upp til oddamannin Thomas Japp Hansen, sum er einar fjúrtan minuttir frammanfyri Gunnar, ið liggur á einum samlaðum fjórðaplássi. Hetta verður tungt at hála innaftur hjá Gunnari.

Danirnir frá Gladsaxe vísa seg at vera sera sterkir, og teir hava dominerað kappingina higartil.

Fríggjakvøldið var einkultstartur á Sandoynni, leygardagin varð koyrt í Suðuroy og sunnudagin verður endabresturin í Havn.

**Úrslit av Statoil Kring Føroyar 2. teinur**

| Nr. | RyggNr. | Navn | Felag | Aldur | Bólkur | Tíð | Km/t |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 33 | Ivan Kristensen | Cycling Gladsaxe | 33 | B | 03:17:43 | 35,20 |
| 2 | 28 | Thomas Japp Hansen | Cycling Gladsaxe | 22 | A | 03:17:43 | 35,20 |
| 3 | 29 | Niels Jakob Thomsen | Cycling Gladsaxe | 25 | A | 03:27:19 | 33,57 |
| 4 | 27 | Gunnar D. Olsen | Tórshavnar Súkklufelag | 38 | H30 | 03:29:16 | 33,26 |
| 5 | 35 | Gregers Rosdahl | Cycling Gladsaxe | 31 | C | 03:33:06 | 32,66 |
| 6 | 30 | Gunnlaugur Jonasson | Hjólreiðafélagi Reykjavíkur | 41 | H40 | 03:34:51 | 32,39 |
| 7 | 24 | Alfreð Harðarson | Hjólreiðafélagi Reykjavíkur | 29 | | 03:35:07 | 32,35 |
| 8 | 25 | Gunnar M. Zoega | Hjólreiðafélagi Reykjavíkur | 29 | | 03:38:38 | 31,83 |
| 9 | 39 | Eli Christiansen | Tórshavnar Súkklufelag | 18 | Junior | 03:44:17 | 31,03 |
| 10 | 26 | Haukur M. Sveinsson | Hjólreiðafélagi Reykjavíkur | 19 | | 03:55:59 | 29,49 |
| 11 | 42 | Jørgen Green | RCR | 65 | H60 | 04:01:32 | 28,82 |
| 12 | 41 | Stig Helm Hansen | Cycling Gladsaxe | 38 | Motión | 04:05:18 | 28,37 |
| Ikki gjøgnumført | | | | | | | |
| 38 | Bárður Husgaard | | Ikki møttur til start | | | | |
| 40 | Christian Guttesen | | Ikki møttur til start | | | | |
| 31 | Sverri M. Edvinsson | | Súkklubrek | | | | |
| 36 | Jákup Johansen | | Ikki súkkla fullan tein | | | | |
| **Ungdómar uml. 90 km** | | | | | | | |
| 1 | 45 | Hans Krosstein | Tórshavnar Súkklufelag | 15 | Junior | 03:30:30 | 33,06 |
| 2 | 43 | Bergur Ingemarsson | Tórshavnar Súkklufelag | 14 | Begynder | 03:33:46 | 32,56 |
| Ikki gjøgnumført | | | | | | | |
| 44 | Danjal Michaelsen | | Givin á Eiðisskarði | | | | |

## Ketan slitnaði

SÚKKLING
*Stefan í Skorini*

Sverri Mohr Edvinsson var sera óheppin á eysturoyarteininum í Statoil Kring Føroyar hóskvøldið.

Tá súkklararnir fóru runt Agnið beint áðrenn málið við Saltangará, slitnaði ketan á súkkluni hjá honum.

Eingin møguleiki var at umvæla skaðan, og Sverri kom tí ikki á málið. Hetta hevur við sær, at Sverri Mohr Edvinsson ikki verður við í samlaðu kappingini, tí tað er eitt krav, at tú hevur fullført allar teinarnar.

Sverri verður mettur sum tann næststerkasti føroyski súkklarin í hesi kappingini, og sæð við føroyskum brillum er tað sera keðiligt, at Sverri nú ikki er við í samlaðu kappingini.

Hann fer tó at súkkla hinar tríggjar teinarnar, sum eftir eru, og hann hevur møguleika at gera seg galdandi á teimum einstøku teinunum, men í samlaðu uppgerðini verður navnið hjá Sverra ikki at síggja.

## Íslendingar fingu miðaltíð

**Íslendsku súkklararnir eru við í samlaðu kappingini, hóast teir ikki vóru við á prologinum**

SÚKKLING
*Stefan í Skorini*

Teir fýra íslendingarnir, sum ikki vóru við í prologinum í Statoil Kring Føroyar í Klaksvík mikudagin, hava fingið eina tillutað eina miðaltíð, so at teir kunnu vera við í samlaðu kappingini, hóast teir ikki hava verið við í øllum etapunum.

Av tí at flogfarið úr Íslandi ikki lendi til tíðina mikudagin, kundu teir ikki luttaka í prologinum í Klaksvík. Hetta gav fyrireikarunum ein trupulleika, tí at íslendingarnir skuldu helst vera við á ein ella annan hátt.

Poul Henrik Poulsen, fyriskipari av kappingini, upplýsir, at íslendingarnir hava fingið eina miðaltíð, sum er roknað út frá tíðini hjá fýra B og C súkklarum. Nú eru teir so við í samlaðu kappingini við hesi tíðini.

Hesa loysnina eru íslendingarnir og hinir súkklararnir væl nøgdir við, hóast onkur teirra møguliga fær eina betri tíð, enn teir í veruleikanum høvdu fingið, um teir súkklaðu við.

Teir íslendsku súkklararnir fara tó ikki at liggja í oddinum samanlagt, og tí fer hetta ikki at hava nakra ávirkan á, hvør vinnur kappingina.





# Ungdómar runnu í Svøríki

**Seinasta vikuskifti vóru seks føroyskir ungdómar við í stórari altjóða ungdómskapping í frælsum ítrótti í Helsingborg í Svøríki. Besta úrslitið fekk Robin Jønsson av Nesi**

FRÆLSUR ÍTRÓTTUR
*Stefan í Skorini*



*Frá vinstru: Hallur Holm, venjari, Bjørk Herup Olsen, Jan Elmar Sørensen, Álvur F. Christiansen, Jóan Karl Joensen, Robin Jønsson Marin í Dali, Bjørk Herup Olsen og Jensina Magnussen, liðleiðari*

Tað er felagið Frælsur Ítróttur Føroya, sum skipaði fyri ferðini og hevur valt rennararnar út. Landsliðið er úttikið við støði í teimum rennikappingum, sum hava verið á stevnunum kring landið. Nakrir av teimum ungdómunum, sum hava fingið góðar tíðir á hesum teinunum, eru síðani tiknir út til landsliðið.

Luttakararnir í hesi kappingini vóru á ógvuliga høgum støði, og tí var ikki væntandi frammanundan, at nakar føroyskur rennari fór at fáa heiðursmerki. Átta tey fremstu fingu heiðursmerki.

### Robin gjørdi bart

Men 13 ára gamli Robin Jønsson av Nesi tók øll á bóli. Í kappingini á 600 metrum bleiv hann nr. 2 í øðrum heati, og tá einans tríggir úr tí skjóta heatinum vóru betri enn hann, endaði hann samanlagt á fimta plássi.

Dagin eftir endurtók hann bragdið, tá hann á 80 metrum vann sítt innleiðandi heat og endaði í A-finaluni við sættu bestu tíð. Hetta pláss vardi hann og gjørdist samanlagt nr. seks eftir tær báðar finalurnar.

Allir føroyingarnir vórðu støðismettir í lægra endanum, men teir megnaðu allir at liva upp til meira enn sína støðismeting, og í flestu førum vóru teir nr. tvey og trý í teirra heatum.

14 ára gamli Álvur F. Christiansen úr Norðdepli fekk eisini eitt gott úrslit á 800 metrum. Eftir at hava ligið heilt aftarlaga í kappingini fór hann brádliga at økja ferðina og av einum sjeynda plássi rann hann seg fram á triðja pláss við 150 metrum eftir. Og hóast 30 metrar fram til teir fremstu, steðgaði Álvur ikki her. Við somu øði legði hann eftir teimum, og endin var at hann vann heatið á sjálvari mállinjuni.



*Robin Jønsson fekk bestu føroysku úrslitini. Vann 5. premiu á 600 metrum og gjørdist nr. 6 á 80 m*

### Fleiri ungdómsmet

Hinir luttakararnir úr Føroyum kláraðu seg væl, og í øllum teimum trettan kappingunum, tey luttóku í, blivu nýggj ungdómsmet sett.

Nú tá rennararnir vóru farnir ta longu leið til Svøríkis gjørdu tey av eisini at kappast á teimum stytstu teinunum. Tað var tó øllum greitt, at her høvdu føroysku rennararnir lítlan møguleika. Næstan øll endaðu í tyngra endanum. Tó megnaði Robin Jønsson at fáa eitt sætta pláss.

Hendan uttanlandsferðin var eisini ein liður í at menna frælsa ítróttin í Føroyum, og ætlanin er at fara undir eitt meira miðvíst landsliðsarbeiði framyvir.

Øresundsspelen, sum kappingin verður nevnd, er ein hin størsta av sínum slag í Norðurlondum. Meira enn 1400 ung og vaksin úr 160 ymiskum feløgum og níggju londum vóru umboðað. Luttakararnir vóru úr Svøríki, Føroyar, Noreg, Danmark, Ísland, Estland, Týskland, USA og Holland.

## Úrslitini:

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Jóan Karl Joensen, Kollafjørður (1987)** | | | |
| 100 m | 13,17 sek | nr. 26 av 29 | Dreingir 17 ár |
| 800 m | 2.15,02 min | nr. 14 av 19 | Dreingir 17 ár |
| 1500 m | 4.40.27 min | nr. 10 av 14 | Dreingir 19 ár |
| **Álvur F. Christiansen, Norðdepli (1989)** | | | |
| 300 m | 46,11 sek | nr. 20 av 29 | Dreingir 14 ár |
| 800 m | 2.24,62 min | nr. 20 av 30 | Dreingir 15 ár |
| **Robin Jønsson, Nes Toftir (1990)** | | | |
| 80 m innl. | 10,68 sek | nr. 6 av 27 | Dreingir 13 ár |
| 80 m finala | 10,67 sek | nr. 6 av 14 | Dreingir 13 ár |
| 600 m | 1.43,04 min | nr. 5 av 23 | Dreingir 13 ár |
| **Jan Elmar Sørensen, Klaksvík (1991)** | | | |
| 80 m | 13,32 sek | nr. 26 av 27 | Dreingir 12 ár |
| 600 m | 1.58,74 min | nr. 15 av 24 | Dreingir 12 ár |
| **Marin í Dali, Trongisvágur (1989)** | | | |
| 300 m | 48,53 sek | nr. 27 av 29 | Gentur 14 ár |
| 800 m | 2. 38,31 min | nr. 18 av 35 | Gentur 15 ár |
| **Bjørk Herup Olsen, Tórshavn (1991)** | | | |
| 80 m 12,99 sek | nr. 36 av 36 | Gentur 12 ár | |
| 600 m | 2.00,01 min | nr. 11 av 23 | Gentur 12 ár |

## Bruttohópur úttikin

HONDBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Landsliðsvenjarin Lars Nedergaard hevur nú tikið 25 leikarar út til ein bruttohóp. Leikararnir skulu venja saman 31. juli og 1. august í ávikavist Vestmanna og Tórshavn.

Hetta er ein liður í fyrireikingunum til landsdystirnar í oktober og november og til fýralandakappingina, sum verður í Luksemborg í desember.

Hesir leikarar hava fingið boð frá venjaranum:

**Málmenn:**
Óla Chr. Djurhuus KÍF
Levi Nybo H 71
Lars L. Black Kyndil
Jens Skipagøta Team Amager

**Útileikarar:**
Halgir D. Olesen H 71
Áki Olsen VÍF
Bárður Brimvík H 71
Janus Einar Sørensen Kyndil
Ingi Olsen VÍF
Hans Áki Dahl-Christiansen Kyndil
Kristjan Madsen KÍF
Regin Petersen KÍF
John Zachariasen VÍF
Sveinur Justinussen StÍF
Áki Mørk Neistin
Áki G. Olsen VÍF
Dann Thorleifsson Neistin
Ragnar Stakksund Neistin
Alexandur Johansen StÍF
Sámal Joensen VÍF
Pauli Hansen StÍF
Bent Djurhuus StÍF
Heini H. Joensen Team Midtsjælland
Tróndur Joensen Team Amager
Marius Joensen IF Stadion0

## Heidi vann fyrstu kappingina

**Heidi Andreasen setti persónligt met á teininum 50 metur frí hósdagin**

SVIMJING
*Stefan í Skorini*

Hósdagin fór Heidi Andreasen í hylin til sína fyrstu kapping í Canadian Open for Swimmers with a Disability.

Hetta var í 50 metur frí, og Heidi gjørdi ikki mætari enn at vinna hesa kappingina. Heidi hevði bestu tíðina á 50 metrum í innleiðandi umfarinum við 34,13 sekundum.

Í finaluni svam Heidi sera væl og við einum góðum spurti vann hon eina tætta kapping. Hon vann við tíðini 32,58 sekund, og tað er persónligt met hjá Heidi. Gamla metið hjá henni var 32,79 sekund, sum hon setti fyri nøkrum vikum síðani.

Pernille Thomsen kom inn á øðrum plássi við tíðini 32,97 sekund, og Cecilie Drabsch fekk bronsuna við tíðini 33,89 sekund.

Í gjár, fríggjadagin, skuldi Heidi svimja 400 metur frí. Leygardagin var 200 metur frí á skránni, og sunnudagin skal hon luttaka í 100 metur frí og 100 metur firvaldasvimjing.